Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# P/F Vágatunnilin

**Heiðavegur 57, Postrúm 119, FO-600 Saltangará**

**P/F-Skrás.nr.: 2809**

## Ársfrásøgn

## 2023

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend av felagsins ársaðalfundi, tann 22.04.2024.

O.J. KRISTOFFERSEN

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 16 |
| Rakstrarroknskapur | 20 |
| Fíggjarstøða | 21 |
| Notur | 23 |

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2023 hjá P/F Vágatunnilin.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2023 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Saltangará, tann 22. apríl 2024

**Stjórn**

Uni Danielsen
stjóri

**Nevnd**

Jens Kári Vilhelm
nevndarformaður

Dánial Tummas Thomsen
næstformaður

Gunnvá Sjálvsdóttir á Lofti
nevndarlimur

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til leiðslan í P/F Vágatunnilin**

Vit hava grannskoðað til ársroknskap hjá P/F Vágatunnilin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023. Góðkennir leiðslan ársfrásøgnina í verandi líki, geva vit ársfrásøgnini hesa grannskoðanarátekning:

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vágatunnilin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2023 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardar um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini."

Tórshavn, tann 22. apríl 2024

**P/F Januar**

løggilt grannskoðanarvirki

Christina á Bøgarði

statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vágatunnilin<br>Heiðavegur 57<br>Postrúm 119<br>FO-600 Saltangará | |
| | Telefon: | (+298) 35 02 00 |
| | Heimasíða: | tunnil.fo |
| | Teldupostur: | tunnil@tunnil.fo |
| | Skr.nr.: | 2809 |
| | V-tal: | 485209 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Jens Kári Vilhelm, nevndarformaður<br>Dánial Tummas Thomsen, næstformaður<br>Gunnvá Sniálvsdóttir á Lofti, nevndarlimur | |
| **Stjórn** | Uni Danielsen, stjóri | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |
| **Assosierað felag** | P/F Tunnil, FO-600 Saltangará | |

## Leiðslufrágreiðing

**Høvuðsvirksemi felagsins**

Høvuðsvirksemi hjá felagnum er smb. viðtøkunum fyri felagið og løgtingslóg um fast samband um Vestmannasund, at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

**Skipan av rakstri**

Raksturin er skipaður í samstarvi við P/F Eystur- og Sandoyartunlar, P/F Norðoyatunnilin og P/F Tunnil, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Avtalað er við P/F Tunnil um felags rakstur av P/F Vága-, Norðoya-, Eysturoyar- og Sandoyartunnilin. Útreiðslurnar verða býttar millum feløgini í mun til ferðsluna í hvørjum tunli, tó soleiðis at serstakar útreiðslur, ið hoyra felagnum til, verða goldnar av hesum. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felag sær.

Felagið hevur skrivstovu í leigaðum hølum á Heiðavegi 57, Saltangará.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við P/F Tunnil. Viðvíkjandi innkrevjingina av tunnilsgjøldunum og raksturin av tunlinum, er avtala gjørd við P/F Tunnil, sum umsitur innkrevjingina og hevur yvirorðnaðu ábyrgdina av rakstrinum av teimum 4 undirsjóvartunlunum Eysturoyartunlinum, Sandoyartunlinum, Norðoyatunlinum og Vágatunlinum. Tekniski raksturin er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

**Tunnilsarbeiðið**

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og tænastusáttmálar eru gjørdir við fleiri fyritøkur um ymiskar tænastur, t.d. viðv. el-installatiónum, pumpuskipanini, gjaldsstøðini, reingerð av tunlinum, dagligum eftirliti í tunlinum v.m.

Pumpuskipanin í Vágatunlinum hevur koyrt hampuliga væl. Neyðugt hevur verið at skift eina pumpu. Tann pumpan sum er skift verður høvuðsumvæld, og kann nýtast sum eykapumpa, tá brúk verður fyri tí. Pumpurnar verða eftirhugdar 2 ferðir um vikuna, og regluligt viðlíkahald verður gjørt eftir tørvi. Elektrisku installatiónirnar til pumpustýringina eru av eldri dato, og mugu skiftast, tá tað gerst torførari at fáa eykalutir. Vatnnøgdin, sum verður pumpað úr tunlinum, hevur verið støðug, uml. 600 m3 um samdøgrið.

Loft og veggir eru kannaði av Rambøll Sverige seint í 2022. Kanna er fyri leysum gróti, rivur, beton, boltar o.l. Miðað verður eftir, at kanning av tunlinum verður gjørd 5. hvørt ár. Ætlanin var at teir skuldu koma í 2020, men orsaka av Covid19 var kanningin útsett. Í frágreiðingini vit fáa frá Rambøll, hava teir ymisk stig har mett verður at í summum økjum skulu ábøtur gerast skjótast tilber, onnur økir skulu eyka boltar setast í o.s.fr. Fari verður væntandi undir at skróta og gera ábøtur í Vágatunlinum á vári 2024.

Vifturnar í Vágatunlinum, sum eru 30 í tali, stava frá tí tunnilin lat upp fyri ferðslu. Upphangini hava verið eftirhugd og í fleiri førum skift. Tvær viftur eru tiknar niður og umvældar.

Á flestu vegum eru sokallaðu rumlufoyrurnar. Í staðinfyri at gera rumlufoyrur hava vit málað miðstrípurnar punktvís við sokallaðum termoplast, hetta er tjúkk "máling", sum bilførarar merkja við ristingum, um teir fara um miðstrípurnar. Við hesi loysn verður ikki grivið í asfaltið.

## Leiðslufrágreiðing

Nakað av arbeiði hevur verið í sambandi við ymiskar trupulleikar við teimum teknisku stýringunum í tunlinum av tí, at el-komponentarnir, sum hoyra til stýringarnar, eldast og mugu skiftast. Hetta verður gjørt sum vanligur rakstur av tunlinum.

Radiosignalið í Vágatunlinum hevur ikki verið gott, fyri ikki at siga vánaligt til tíðir.. Vit hava havt fólk at hyggja uppá hetta, men útgerðin er frá tí tunnilin lat upp í 2002, og tí er trupult at fáa eykalutir. Vit vóna at fáa hetta í rættlag skjótt.

Frá statusdegnum til í dag eru ikki viðurskiftir sum ávirka raksturin.

### Gjaldskipan og rakstur

Øll innkrevjing er løgd í eitt felag P/F Tunnil, sum varð stovnað í 2019. Felagið varð stovnað av teimum trimum feløgunum P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar, sum eigarar við hvør sínum triðingi av samlaða partapeninginum á kr. 510.000. Feløgini hava gjørt avtalu við P/F Formula, sum hevur ment eina føroyska skipan. Høvuðsatliti við skipanini er, at gera umsitingina av innkrevjingini bíliga, effektiva og kundavinarliga. Við hesi skipan hava vit við verandi umsiting við lítlari tillaging, megna at krevja inn vegna Vágatunnilin, Norðoyatunnilin og Eysturoyartunnilin. Síðan Sandoyartunnilin lat upp fyri ferðslu, er hann eisini partur av somu innkrevjingarskipan. P/F Tunnil umsitur eisini raksturin av tunlunum.

Fyrimunirnir við at hava eitt felag eru m.a.

- Kundin tørvar ikki at hugsa um, hvar gjaldið fyri koyring skal rindast
- Kundin hevur eitt stað at gjalda
- Kundin skal ikki hugsa um, hvørt tunnilsfelag skal gjaldast til
- Kundin kann framvegis hava **eitt** hald til allar tunlarnar
- Umsitingarligar sparingar
    - Útreiðslur fyri umsiting av innkrevjing verður býtt millum feløgini í mun til ferðsluna í hvørjum tunli
    - Somu starvsfólk sum vóru frammanundan, taka sær av kundum og gjøldum
    - Sleppast kann undan dupultfunktiónum
    - Kostnaður av menning av skipanum er býtt millum tunnilsfeløgini
- Hvørt tunnilsfelag er framvegis ein sjálvstøðug inntøku-, kostnaðar- og íløgueind og beinleiðis kostnaðir v.v. einum tunli, verður goldið av tí tunlinum, sum kostnaðurin viðvíkur.

## Leiðslufrágreiðing

**Stutt um mannagongdirnar tá koyrt verður**

Tá talan er um hald, teknar kundin eitt hald hjá P/F Tunnil, sum er galdandi fyri VT, NT, ET og ST. Inngjøldini verða goldin til P/F Tunnil, og so hvørt sum koyrt verður, avroknar P/F Tunnil, til tann tunnilin har koyrt er.

Stakir túrar (túrar, tá ein ikki hevur hald), verða kravdir inn av P/F Tunnil og avroknaðir til rætta tunnilin.

Akfør við útlendskum nummarspjøldrum, sum ikki hava hald, gjalda umvegis heimasíðuna. Ein møguleiki, sum fleiri útlendingar gera nýtslu av, er at teir knýta gjaldskort til gjaldsskipanina, og so hvørt teir koyra í einum gjaldstunli, verður tunnilsgjaldið trekt av kortinum.

Greiður fíggjarligur skilnaður er millum tunlarnar. Felagsútreiðslurnar fyri at krevja inn, verða deildar millum feløgini í mun til ferðsluna í teimum einstøku tunlunum. Í 2023 hevur gjaldsbýtið av útreiðslunum í P/F Tunnil verið: Eysturoyartunnilin 46%, Vágatunnilin 21% og Norðoyatuinnilin 33%.

**Frí ferðsla**

Eins og undanfarin ár vóru ársdagarnir, tá ið ávikavíst Vágatunnilin og Norðoyatunnilin lótu upp fyri ferðslu, hátíðarhildnir við at opið varð uttan at nýtslugjald var kravt. Umframt hetta vóru tveir tunnilsdagar lagdir í samráð við Kunningarstovuna í Vágunum. Tað vísir seg at hesir dagar lítla og onga ávirkan hava á ferðslumynstrið.Men frá handilslívinum og ferðavinnuni í Vágum, hevur tað framhaldandi verið eitt ynski at fasthalda tunnilsdagarnar. Hetta hava vit eftirlíkað.

**Gongdin í virksemi og fíggjarligum viðurskiftum**

Ársins nettosøla er 11,2 mió kr. sum er sami umsetningur sum undanfarna ár. Av rakstrinum fóru m.a. 2,6 mió. kr. til rakstur av tunli og vegum, tryggingar 0,2 mió kr., 1,8 mió. kr. til fyrisiting og innkrevjing, 0,9 mió. kr. til el, 4,7 mió. kr. til avskrivingar. Rentuinntøkurnar vóru 0,5 mió. kr.

Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 2,0 mió. kr. samaborið við 1,4 mió kr. undanfarna ár.

Leiðslan metir ársúrslitið vera nøktandi.

Tøki peningurin er í 2023 øktur við 8,4 mió. kr., frá 35,8 mió kr til 44,1 mió. kr.
Felagið hevur harumframt 35,5 mió. kr. í virðisbrøvum við árslok.

**Fígging**

Vágatunnilin varð upprunaliga fíggjaður við láni frá Íleggingargrunnin fyri Føroyar og partapeningi frá tí almenna.

Lánisáttmálin sum upprunaliga varð gjørdur við Íleggingargrunnin í 2002, tá tunnilin lat upp fyri almennari ferðslu, varð afturgoldin í 2017 yvir tey 15 árini sum lániavtalan fyriskrivaði. Saldoin á láninum var goldin longu í 2013 við gjalførinum felagið hevði.

Íløgur sum felagið ger í samband við ábøtur o.l. eru sjálvfíggjandi.

## Leiðslufrágreiðing

**Serligir váðar**
Um pumpurnar steðga, er umráðandi at tað vikuliga er ein vaktarskipan sum kannar pumpurnar. Felagið hevur gjørt avtalu við MEST og Ansni um eftirlit.

**Rakstrar váði**
Um kamera skipanin er óvirkin, ber ikki til at skráseta akfør. Hetta er onkuntíð komi fyri. Felagið hevur gjørt íløgur í nýggj kamera, sum eru redundant, sum merkir at tað altíð er eykakamera, um tað eina skuldi gingið fyri.

**Ferðsla. Frá oyggjasamfelag til ein "spjaddur býur".**
Í dag eru sjey av oyggjunum (Viðoy, Borðoy, Kunoy, Eysturoy, Streymoy, Vágoy og Sandoy) knýttar saman við byrgingum, brúgv og undirsjóvartunlum.Sambært hagtølum frá Hagstovuni, búðu á hesum 7 oyggjum í desember 2023 49.506 íbúgvar. Samlaða fólkatalið í Føroyum var 54.547. Sostatt eru 90,8% av íbúgvunum í Føroyum samanbundnir í eitt vegakervi.

Í talvuni niðanfyri hava vit eisini nevnt ferðafólkatalið, sum fór um flogvøllin. Hesi hava stóran týdning fyri ferðsluna í Vágatunlinum, mett er at áleið 35-40% av ferðsluni í Vágatunlinum hevur samband við flogvøllin. Ferðslan um flogvøllin var í 2020 og 2021 nógv merkt av Covid 19. Ferðafólkatalið um flogvøllin fór úr 424.281 ferðafólk í 2019 til 179.778 í 2020, ein minking á 57,6%. Í 2021 vaks ferðafólkatalið nakað til 239.085, og í 2023 er ferðafólkatalið økt til 431.079.



**Samanbindur 90,8% av íbúgvunum.**

**Fólkatal:**

| | |
|---|---|
| **Streymoy** | **26.004 (47,7%)** |
| **Eysturoy** | **12.540 (23,0%)** |
| **Vágar** | **3.419 ( 6,3%)** |
| **Norðoyggjar** | **6.292 (11,5%)** |
| **Sandoy** | **1.251 ( 2,3%)** |
| **Í alt** | **49.506 (90,8%)** |

**Aðrar oyggjar 5.041 (9,2%)**
**Íalt (desember 2023, hagstovan) 54.547**

**Flogvøllurin 2023 431.079**

Mynd 1

Sum nevnt eru 90,8% av íbúgvunum knýttir í eitt vegakervið. Sjey av oyggjunum eru nú knýttar saman. Harvið kunnu vit næstan siga at Føroyar flyta seg frá at vera eitt oyggjasamfelag til ein spjaddur býur. Talan hevur verið at byggja undirsjóvartunnil til Suðuroyar. Verður tað veruleiki, verða einans 442 íbúgvar, sum tá ikki hava fast samband, ella 0,8% av íbúgvunum. Við tølunum frá Hagstovuni eru tey 442 fólkini býtt á hesar oyggjar: Nólsoy 221 íbúgvar, Kallsoy 89, Fugloy 42, Svínoy 31, Hestoy 15, Mykines 13, Skúvoy 26, og Stóra Dímun 5 íbúgvar.

## Leiðslufrágreiðing

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ferðslan er deild yvir árið og hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar frá 2019 til 2023. Tveir teir fyrstu mánaðirnir í 2024 eru eisini á myndini.




| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 2.071 | 2.180 | 2.280 | 2.633 | 2.789 | 2.973 | 3.264 | 3.075 | 2.774 | 2.679 | 2.331 | 2.227 |
| 2020 | 2.101 | 2.268 | 1.735 | 1.519 | 1.901 | 2.286 | 2.817 | 2.470 | 2.330 | 2.303 | 1.998 | 1.991 |
| 2021 | 1.827 | 2.060 | 2.327 | 2.152 | 2.416 | 2.581 | 3.127 | 3.055 | 2.780 | 2.709 | 2.319 | 2.250 |
| 2022 | 1.911 | 2.007 | 2.458 | 2.816 | 3.092 | 3.305 | 3.345 | 3.342 | 2.984 | 2.767 | 2.503 | 2.104 |
| 2023 | 2.215 | 2.315 | 2.399 | 2.848 | 3.154 | 3.434 | 3.619 | 3.374 | 3.071 | 2.901 | 2.589 | 2.356 |
| 2024 | 2.253 | 2.472 | 2.857 | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |

Mynd 2. Miðalferðsla pr. dag frá 2019 til 2023 og jan. feb. mars 2024.




Mynd 3. Ferðslan hevur í 2023 verið í miðal 2.859 akfør/døgn, í mun til 2.723 akfør/døgn árið fyri. Myndin vísir eisini ferðsluna tvey tey seinastu árini áðrenn fasta sambandið. Í 2001 og 2002 fóru ávikavist 274 og 301 akfør dagliga flutt um Vestmannasund við ferju.

Samlaða ferðslan og prosentvísa broytingin síðan tunnilin opnaði, sæst niðanfyri:

| Ár | Akfør | % broyting |
|---|---|---|
| 2003 | 359.440 | |
| 2004 | 375.958 | 4,6% |
| 2005 | 422.920 | 12,5% |
| 2006 | 524.992 | 24,1% |
| 2007 | 563.188 | 7,3% |
| 2008 | 576.956 | 2,4% |
| 2009 | 585.826 | 1,5% |
| 2010 | 580.750 | -0,9% |
| 2011 | 593.178 | 2,1% |
| 2012 | 594.384 | 0,2% |
| 2013 | 620.072 | 4,3% |
| 2014 | 666.457 | 7,5% |
| 2015 | 681.673 | 2,3% |
| 2016 | 746.070 | 9,5% |
| 2017 | 839.750 | 12,6% |
| 2018 | 896.864 | 6,8% |
| 2019 | 952.300 | 6,2% |
| 2020 | 784.674 | -17,6% |
| 2021 | 901.682 | 14,9% |
| 2022 | 994.076 | 10,3% |
| 2023 | 1.043.670 | 5,0% |

Mynd 4. Árliga ferðslan og %-broyting síðan tunnilin lat upp fyri ferðslu.




Mynd 5. Tal av akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunnilin árliga frá 2003 til 2023. Tvey tey seinastu árini áðrenn tunnilin lat upp, vórðu árliga um 100.000 til 110.000 akfør flutt um Vestmannasund við ferju.

**Nýtslugjøld og gjaldstøð**

Nýtslugjøldini eru støðugt lækkaði síðan tunnilin varð tikin í nýtslu fyri 21 árum síðan. Prísirnir fyri persónbilar eru lækkaðir við millum 47% og 82%. Prísurin fyri staka koyring í des. 2002, tá tunnilin lat upp, var kr. 188,-. Í dag er prísurin kr. 100,-. Prísurin fyri hald var upprunaliga kr. 112,- fyri hvønn túr. Nú er prísurin kr. 20,-. Prísgongdin síðan tunnilin varð tikin í nýtslu, sæst niðanfyri (Mynd 6).




Mynd 6: Prísgongdin fyri persónbilar síðan tunnilin lat upp fyri stakar túrar og prísur við avsláttarskipan. Stakir túrar eru lækkaðir 47%, haldprísurin er lækkaður 82%.

Felagið gjørdi av fyri 2 árum síðan at lækka hámarksgjaldið fyri privatbilar við haldi. Hámarksgjaldið sum var kr. 500, er nú kr. 300,-. Hetta merkir at tá koyrt er framvið gjaldstøðina 15 ferðir, er einki gjald fyri túr 16, 17 o.s.fr.



## Leiðslufrágreiðing

Mynd 7: Prísir fyri hald og stakir túrar fyri lastvognar, bussar og trailarar síðan tunnilin lat upp. Yvir 12m v/hald eru lækkaðir 94%, og millum 6m og 12m lækkaðir 91%. Stakir túrar yvir 12m lækkaðir 78%, millum 6m og 12m lækkaðir 67%. Í juni 2022 lækkaði haldprísurin fyri lastbilar/bussar úr kr. 100,- niður í kr. 50,-

Herundir miðalprísurin sum verður funnin við at deila samlaða umsetningin við samlaðu ferðsluna. Á mynd 8 niðanfyri sæst gongdin í miðalprísunum síðan tunnilin lat upp. Í 2023 var miðalprísurin kr. 21,50.




Mynd 8. Miðalgjald pr. akfar sum fer framvið gjaldstøðini. Frá 2003 til 2023 er miðalprísurin lækkaður við 85,4%.

Á myndini niðanfyri er víst index fyri ferðsluna síðani tunnilin lat upp, og hvussu gongdin í miðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2003 er sett til 100).




Mynd 9. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu

## Leiðslufrágreiðing

Gongdin vísur, at samlaða ferðslan síðan byrjan er økt 190%. Miðalprísurin er lækkaður 85%. Tað ber tó ikki til einans at vísa á at elastisiteturin er tengdur at prísinum, tí m.a. er talið á akførum økt munandi í sama tíðarskeið og flogferðslan er eisini økt munandi.

**Staktúrar/Hald**

Í desember 2023 vóru íalt 42.040 akfør skrásett hjá Akstovuni. Av hesum skulu 34.032 gjalda um teir koyra í Vágatunlinum. Har eru eisini skrásettir t.d. viðfestivognar, kampingvognar, prutl v.m. sum ikki gjalda. Við endan á 2023 vóru 22.929 hald skrásett hjá P/F Tunnil. Á hesi hald vóru 33.901 akfør skrásett. Sostatt hava meira enn 99% av føroysku akførunum hald.

95% av inntøkunum hjá felagnum stava frá hald, og 5% av inntøkunum stava frá støkum túrum.

**Hvar eru akførini skrásett**

Talvan niðanfyri vísir hvar akførini, sum nýta Vágatunnilin, eru skrásett, og hvussu stóran prosentpart hesi gjalda. Dømi: Av teimum sum nýta tunnilin eru 34,5% skrásett í Vágunum og hesi gjalda 30,6% av samlaða umsetninginum, 45,5% eru skrásett á Streymoynni og gjalda 46% av umsetninginum.




Mynd 10. Vísir í % hvar úr landinum tey sum koyra eru skrásett, og hvussu nógv hesi gjalda.

## Leiðslufrágreiðing

**Umhvørvisviðurskifti**

**Heilsa, trygd og umhvørvi**

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnilin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minnst og fyri at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini, verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma. Arbeiðið verður soleiðis lagt til rættis, at ein koyribreyt altíð kann opnast við stuttum skotbrá, so neyðsendara akfør sleppa ígjøgnum.

Eitt krav frá myndugleikunum er, at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarvi við allar partar sum kunnu hugsast at verða ein liður í hjálpararbeiðinum, um óhapp er í tunlinum. Tað verði seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Arbeiðseftirlitið o.o.

Størri venjingar skulu helst vera 5. hvørt ár. Ætlanin er at hava eina størri venjing í 2024.

Tað eru javnan smærri venjingar sum sløkkiliðini sjálvi taka stig til.

**Mál av samfelagsligum týdningi**

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina. Vágatunnilin er einasta samband millum Streymoynna og Vágoynna, tí er umráðandi at tunnilin altíð er opin fyri ferðslu. Vágatunnilin er partur av tilbúgving landsins.

**Framtíðarútlit**

Felagið væntar økta ferðslu í tunlinum í 2024 í mun til 2023, og harvið eitt betri úrslit komandi ár. Felagið væntar at gera íløgur í nýggjar neyðtelefonir, motorar til viftur, skróta, nýggj UPS anlegg, neyðskáp v.m. áleið 4 mió kr.

**Hendingar eftir roknskaparlok**

Frá roknskaparloki til í dag er einki hent, sum hevur týðandi ávirkan á roknskapin.



## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri P/F Vágatunnilin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Alment um innrokning og virðisáseting**
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Rakstrarroknskapurin

**Nettosøla**
Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir, tap uppá áogn og operationellar leasingkostnaðir.

## Nýttur roknskaparháttur

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Av- og niðurskrivingar**

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av materiellari støðisogn.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**

Fíggjarligir postar umfata rentur, staðfestan og ikki staðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum umframt amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

**Skattur av ársúrslitinum**

Skattur í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina verður bókaður á eginognina.

### Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um beinleiðis og óbeinleiðis kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum og løn umframt lánskostnaðir frá specifikkari og generellari lántøku, sum beinleiðis viðvíkir einstøku ognini, meðan hon er í gerð.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Jøvn avskriving verður framd grundað á meting av væntaðu brúkstíð og væntaðum restvirði hjá ognunum, sí niðanfyri:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Vegir og tunnil | 50 ár | 0 % |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 5-10 ár0 | % |

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum sølupris við frádrátti av sølukostnaðum og roknskaparliga virðið á søludegnum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur og aðrir rakstrarkostnaðir.

## Nýttur roknskaparháttur

**Niðurskriving av støðisogn**

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn, umframt kapitalpørtum í assosieraðum fyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

Áður innroknaðar niðurskrivingar verða afturførdar, tá ið grundarlagið fyri niðurskrivingini ikki er longur. Niðurskriving viðvíkjandi goodwill verður ikki afturførd.

**Fíggjarlig støðisogn**

**Kapitalpartar í assosieraðum feløgum**

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er endurvinningarvirði lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

**Onnur virðisbrøv og kapitalpartar**

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, ið ikki eru skrásett á virðisbrævamarknaði, verða innroknað til kostprís. Um endurvinningarvirðið er lægri enn kostprísur, verður niðurskrivað til lægra virði.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata útgjøld, sum viðvíkja kostnaðum komandi roknskaparári.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

## Nýttur roknskaparháttur

### Skuld

Onnur skuld verður tikin við til amortiseraða útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2023<br>kr. | 2022<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Nettosøla | 11.243.735 | 11.232 |
| 2 | Tunnilskostnaðir | -2.629.287 | -2.441 |
| 3 | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -1.823.460 | -2.161 |
| | **Bruttoúrslit** | **6.790.988** | **6.630** |
| 4 | Starvsfólkakostnaðir | -161.654 | -128 |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari støðisogn | -4.708.103 | -4.690 |
| | **Rakstrarúrslit** | **1.921.231** | **1.812** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 521.024 | 0 |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 0 | -164 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **2.442.255** | **1.648** |
| 5 | Skattur av ársúrsliti | -439.606 | -297 |
| | **Ársúrslit** | **2.002.649** | **1.351** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 2.002.649 | 1.351 |
| **Býtt tilsamans** | **2.002.649** | **1.351** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### OGN

| Nota | | 2023<br>kr. | 2022<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 6 | Tunnil | 160.891.172 | 165.599 |
| 6 | Annar útbúnaður, rakstrargøgn og innbúgv | 625.762 | 4 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 161.516.934 | 165.603 |
| 7 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 170.000 | 170 |
| | Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | 35.541.344 | 0 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 35.711.344 | 170 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **197.228.278** | **165.773** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 70.855 | 54 |
| | Áogn hjá assosieraðum fyritøkum | 0 | 1.407 |
| | Onnur áogn | 95.301 | 283 |
| | Tíðaravmarkingar | 191.109 | 244 |
| | Áogn tilsamans | 357.265 | 1.988 |
| | Tøkur peningur | 8.611.477 | 35.764 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **8.968.742** | **37.752** |
| | **OGN TILSAMANS** | **206.197.020** | **203.525** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | 2023<br>kr. | 2022<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 8 | Felagskapitalur | 160.300.000 | 160.300 |
| 9 | Flutt úrslit | 36.048.854 | 34.046 |
| | **Eginogn tilsamans** | **196.348.854** | **194.346** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 10 | Avsett til útsettan skatt | 9.450.215 | 9.011 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **9.450.215** | **9.011** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 238.877 | 168 |
| | Skuld til assosieraðar fyritøkur | 159.074 | 0 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 397.951 | 168 |
| | **Skuld tilsamans** | **397.951** | **168** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **206.197.020** | **203.525** |

## Notur

| | | 2023 kr. | 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Nettosøla** | | |
| | Søla | 11.222.719 | 11.211 |
| | Leiguinntøkur | 21.016 | 21 |
| | | **11.243.735** | **11.232** |
| **2.** | **Tunnilskostnaðir** | | |
| | Orkunýtsla | 875.514 | 614 |
| | Trygd, tilbúgving og tøkniligar tænastur | 588.178 | 430 |
| | Umvælingar, ábøtur og viðlíkahald | 479.273 | 766 |
| | Tænastusáttmáli - Ansni og Q-Free v.m. | 212.382 | 169 |
| | Eftirlit, vaktarhald og reingerð | 114.336 | 149 |
| | Tryggingar | 264.574 | 226 |
| | Telesamskifti | 95.030 | 87 |
| | | **2.629.287** | **2.441** |
| **3.** | **Aðrir uttanhýsis kostnaðir** | | |
| | Fyrisitingarkostnaðir | 107.903 | 163 |
| | Umsitingargjald - P/F Tunnil | 1.715.557 | 1.998 |
| | | **1.823.460** | **2.161** |
| **4.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Lønir | 145.050 | 117 |
| | Eftirlønir | 9.450 | 5 |
| | Onnur almenn gjøld | 7.154 | 6 |
| | | **161.654** | **128** |
| **5.** | **Skattur av ársúrsliti** | | |
| | Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| | Broyting í útsettum skatti | 439.606 | 297 |
| | | **439.606** | **297** |

### 6. Materiell støðisogn

| | Tunnil kr. | Annar útbúnaður, rakstrargøgn og innbúgv kr. |
|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 321.456.478 | 679.111 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 622.199 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **321.456.478** | **1.301.310** |
| Av- og niðurskrivingar primo | 155.858.050 | 674.700 |
| Avskrivingar í árinum | 4.707.256 | 848 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **160.565.306** | **675.548** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **160.891.172** | **625.762** |

| | 31/12 2023 kr. | 31/12 2022 t.kr. |
|---|---|---|
| **7. Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan primo | 170.000 | 170 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **170.000** | **170** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **170.000** | **170** |

**Høvuðstølini hjá fyritøkunum sambært seinast góðkendu ársfrásøgnunum**

| | Ognar-partur | Eginogn kr. | Ársúrslit kr. | Roknskaparligt virði hjá P/F Vágatunnilin kr. |
|---|---|---|---|---|
| P/F Tunnil, FO-600 Saltangará | 33,3 % | 0 | 0 | 170.000 |
| | | **0** | **0** | **170.000** |

# Notur

| | | 31/12 2023<br>kr. | 31/12 2022<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **8.** | **Felagskapitalur** | | |
| | Felagskapitalur primo | 160.300.000 | 160.300 |
| | | **160.300.000** | **160.300** |
| **9.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 34.046.205 | 32.695 |
| | Flutt úrslit í árinum | 2.002.649 | 1.351 |
| | | **36.048.854** | **34.046** |
| **10.** | **Avsett til útsettan skatt** | | |
| | Avsett til útsettan skatt primo | 9.010.609 | 8.714 |
| | Útsettur skattur í árinum | 439.606 | 297 |
| | | **9.450.215** | **9.011** |